**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1828**
**Tíðarskeið 15-19 juni 2018**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Karin Margretha H. Larsen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum seks standardskurðunum. Túrurin er partur av FARMON II verkætlanini.

**Reiðskapur:** SeaBird-CTD, WP2 glúpur, útgerð til prøvatøku av djóraæti og tøðevni. Útgerð at leggja ADCP-rammir og aðra útgerð út við. Útgerð at dreggja við.

**Um túrin:** Vegna nógvan vind hósdag 14/6 fóru vit ikki út fyrr enn fríggjadagin 15/06 kl 1300. Vit løgdu leiðina út á Fugloyartunguna, har ein ADCP-ramma skuldi leggjast út. Vit sigldu spakuliga og vóru á leiðini kl 23. Tá hevði aldan lagt seg so mikið, at tað var hildið ráðiligt at leggja rammuna út. Tað varð so gjørt, og ramman bleiv løgd út á 460 m dýpi í øllum góðum. Stutt haðani løgdu vit eisini eina ADCP-boyu út á knapt 700 m dýpi. Síðan gekk leiðin norðurum á N-skurðin, sum gongur eftir 06° 05'W. Har løgdu vit fyrst eina botnhitarammu út á 450 m dýpi, síðani eina ADCP-fortoying út á 975 m, eina Aanderaa fortoying út á 1200 m dýpi og at enda eina stutta ADCP fortoying afturat á 1450 m dýpi. Hetta gekk alt væl, og vit vóru liðug norðanfyri leygardagin 17/06 kl 14.

Siglt var nú vestur á Íslandsryggin, har vit tóku skurð R eysturyvir inn móti Mykinesi. Hesin skurður var liðugur sunnumorgun 18/06 kl 0520, og vit fóru nú í Bankarennuna at leggja eina ADCP-fortoying og eina botnhitarammu út. ADCPin bleiv løgd út á vanliga staðnum, sum er miðskeiðis í rennuni, har rennan er grynst, og ramman bleiv løgd á 570 m dýpi í kantinum Landgrunnamegin. Hetta gekk alt væl, og vit vóru liðug kl 1115.

Av tí, at hann segði frá nógvum vindi, gekk leiðin nú á Munkagrunnin, har ætlanin var at dreggja eftir eini ADCP-rammu, sum ikki kom upp í 2016. Vit vóru á leiðini sunnukvøldið kl 21, og tá vóru framvegis hampulig líkindir. Vit royndu at fáa samband við rammuna, og hon svaraði, sum vanligt. Síðani koyrdu vit dreggið út og tóvaðu tvørtur um knattstøðuna hjá rammuni. Síðani royndu vit aftur at fáa samband við rammun, men hon lá í sama stað og var ikki komin upp. Nú var vindurin frískaður, og tað var eisini blivið skýggjað og myrkt í veðrinum, og tískil vóru ikki líkindir at halda fram. Sostatt góvust vit at dreggja og løgdu leiðina móti støð S08 miðskeiðis í Hetlandsrennuni.

Mánamorgun 18/06 kl 0240 byrjaðu vit at taka CTD og glúp á S-skurðinum. Á fjórðu støð fór sambandið við CTDina tá hon var komin á 36 m dýpi. CTDin var tikin innaftur, og kaðalin skoyttur av nýggjum. Síðani hildu vit fram við at taka CTD og glúp inn móti Munkagrunninum. Líkindini vóru vánalig, og vit vóru ikki liðug fyrr enn týsmorgun 19/06 kl 0600. Ætlanin var eisini at taka K-skurðin vestur úr Koltri, men vegna veður var ætlanin slept. Vit sigldu tí ímóti Havnini, og á leiðini tóku vit eina CTD-støð eystan fyri Suðuroy fyri at kalibrera ein hita- og saltmátara, og út fyri Skopun tóku vit at enda ein WP2-glúp. Vit vóru á Havnini týsdag 19/06 kl 1630.

**Prøvataking:** Við Seabird CTDini tóku vit 19 støðir og saltprøvar á umleið aðru hvørjari støð. Við WP2-glúpinum tóku vit 11 støðir, og prøvar til tøðevnir blivu tiknir á støð S08. Ein Sea-Bird SBE37 bleiv kalibreraður á síðstu CTD-støð.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst og hinir prøvarnir í summar.

**Viðmerkingar:** K-skurðurin bleiv ikki tikin vegna veður, og ov stutt tíð var til at dreggja. Nógv grind var at síggja í Hetlandsrennuni.

20-06-2018

Karin Margretha H. Larsen



*Mynd 1. Kósir og støðir á túri 1828. Loggdata mangla frá støðini eystan fyri Suðuroy til støðina í Skopunarfirði.*